# Langar løtur í løgtinginum

**Løgtingið fundaðist til langt út á mikukvøldið, og tingið varð tíðliga til arbeiðis aftur hósmorgunin. Løgtingsmenn hava úr at gera við viðgerðum av øllum teimum mongu tingmálunum, sum komu inn seinastu framløgudagarnar**

LØGTINGIÐ
*Eyðun Klakstein, eydun@sosialurin.fo*

– Tað er strævið.

Soleiðis plagar ævigtlesandi Esmar Eysturoy at taka til, tá einki stendur til.

Og kanska freistast okkurt tingfólk í hesum døgum til at siga tað sama.

Í øllum førum hava tingfólk nógv meira at gera í løtuni, enn tey vanliga hava.

Orsøkin er fyrst og fremst, at ein rúgva av uppskotum vóru løgd fyri løgtingið seinastu framløgudagarnar, sum vóru fyrst í mars, og nú skulu øll hesi uppskot hava fyrstu viðgerð í løgtinginum.

Mikudagin fóru løgtingsfólk til arbeiðis klokkan 10 á morgni, og tingfundurin var ikki lokin fyrr enn eftir klokkan 9 á kvøldi. Tingið viðgjørdi hendan langa dagin alt frá eykajáttanarlóg fyri mars, til fiskapakkan, ferðslu og loftmiðlar.

### Eina tíma fyrr

Vanligt er, at tingfundir fyrrapart byrja klokkan 10, men hósmorgunin kallaði løgtingsformaðurin tingið saman longu klokkan 9, tí so nógv er at fara um.

Hósdagin vóru nógv og ymisk mál til 1. viðgerð í løgtinginum.

Dagurin byrjaði við uppskoti um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung, og síðani varð farið til landsskúlalæknaskipan, reiðarívirksemi, nýggjan fiskivinnuskúla, skatt og sølu av rúsdrekka.

Tað hevur verið vanligt, at tingfólk hava úr at gera hesa tíðina, tí so nógv uppskot verða løgd fyri tingið beint áðrenn evstamark, og tey skulu øll viðgerast, áðrenn tey vera beind í nevnd.

# »Støðan er verri enn nakrantíð«

**– Vandin fyri at gera feilir er nógv størri, tá ið so stórt tíðarpress er á viðgerðini í løgtinginum, sigur Kári P. Højgaard, sum er einsamallur tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin, nú løgtingið viðger eina ørgrynnu av uppskotum – summi fleiri hundrað síður til longdar**

TINGARBEIÐI
*Eyðun Klakstein, eydun@sosialurin.fo*



*– Hóast formansskapurin í løgtinginum hevur roynt at gera nakað við trupulleikan, so er støðan helst verri enn nakrantíð, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, um afturvendandi trupulleikan, at so nógv uppskot verða løgd fyri tingið beint áðrenn evstamark*

Tað er mest sum ógjørligt hjá løgtingsfólkum at fylgja við í tinginum í hesum døgum. Øll tey mongu uppskotini, sum vórðu løgd fyri tingið seinastu framløgudagarnar í mars, skulu nú viðgerast, og tað er næstan vónleyst at seta seg inn í øll mál.

Trupulleikin er størstu hjá Kára P. Højgaard, sum er einsamallur tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin.

– Sjálvt teir stóru flokkarnir hava trupuleikar at fylgja við, so tað sigur seg sjálvt, at tað er øgiliga strævið hjá mær, sigur Kári P. Højgaard.

– Men vandin við øllum hesum uppskotunum er ikki, at tingmenn skulu arbeiða yvir og hava langar dagar. Tann stóri vandin er, at møgulekin at gera feilir er nógv størri, tá ið so stórt tíðarpress er á viðgerðini í løgtinginum, og tað er ikki nøktandi, sigur hann.

### Støðan versnar

Mikudagin og hósdagin hevði løgtingið fleiri enn 20 uppskot til viðgerðar, og næstu tríggjar arbeiðsdagarnar í tinginum koma 17 nýggj uppskot til viðgerðar.

– Hóast formansskapurin í løgtinginum hevur roynt at gera nakað við hendan trupulleika, so er støðan helst verri enn nakrantíð, sigur Kári P. Højgaard.

– Formansskapurin hevði tíðliga í ár fund við allar flokkarnar, har tað varð heitt á øll um at virka fyri, at tingarbeiðið gjørdist meira støðugt, og at so nógv uppskot ikki vóru løgd fyri tingið í síðstu løtu. Men hetta hevur so at siga onga ávirkan havt.

Kári P. Højgaard heldur, at hetta er ein stórur trupulleiki fyri løgtingið, og viðgerðin í løgtinginum – bæði í tingsalinum og í nevndunum – verður merkt av órímiliga stóru arbeiðsbyrðuni.

### 88.000 síður í einum máli

Tað eru ikki bara smá mál, sum verða løgd fyri løgtingið beint undan evstamarkinum. Fýra ríkislógartilmæli um peningalig viðurskifti, sum verða viðgjørd undir einum, eru so stór, at skuldi hvørt tingfólk havt eitt eintak av øllum tilfarinum, skuldu 88.000 síður prentast samanlagt. Og hesi fýra mál eru bara nøkur fá mál í stóru rúgvuni.

– Fíggjarnevndin fær eini 13 ella 14 mál til viðgerðar næstu tíðina, og tá ið ætlanin er, at tingið skal fara heim seinast 1. mai, so sigur tað seg sjálvt, at viðgerðin verður merkt av stórum tíðarpressi, sigur Kári P. Højgaard.

– Hendan støðan kann ikki halda fram, og vit mugu tryggja okkum, at tað verður meira støðugt arbeiði í løgtinginum, og at uppskot verða løgd fram alt tingárið. Vit høvdu til dømis lítið og einki at gera í januar og februar mánaði, men nú er øgiligt trýst á, sigur tingmaðurin fyri Sjálvstýrisflokkin.

# Alivinnan ov krevjandi fyri føroyskar bankar

**Norðoya Sparikassi ætlar sær at halda fingrarnar burtur frá alivinnuni, hóast vinnan hevur brúk fyri bæði nýggjum íleggjarum og nýggjari fígging. Stjórin í Norðoya Sparikassa heldur, at alivinnan er við at gerast ov stór hjá føroyskum peningastovnum at fíggja**

ALIVINNA
*Eyðun Klakstein, eydun@sosialurin.fo*



*– Samlaði eginpeningurin hjá føroysku peningastovnunum er um 2,5 milliardir krónur, og skuldin í alivinnuni hevur verið um eina milliard krónur. At lána 40 prosent av eginpeninginum út til eina einstaka vinnu, sum er merkt av so stórum váða, kann blíva ein ov stórur váði fyri føroysku peningastovnarnar í longdini, heldur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa*

**Klaksvík:** Norðoya Sparikassi ætlar sær ikki at fara við í alivinnuna, nú vinnan í Norðoyggjum hevur brúk fyri bæði nýggjum kapitali og nýggjari fígging.

– Vit eru blivnir spurdir fleiri ferðir um hetta seinastu 12 árini, og vit fingu eisini spurningin, tá tað gekk sera væl hjá vinnuni fyri trimum árum síðani, men vit hava sagt nei til fíggja alivinnuna, og vit hava ikki broytt hugsan, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.

– Vit hevldur vilja fíggja nógv í fiskivinnuni á sjógvi og á landi í Norðoyggjum, og tí kunnu vit ikki eisini fíggja eina alivinnu, sum hevur verið í kreppu fleiri ferðir.

### Stór óvissa um virksemi

Alivinnan í Norðoyggjum hevur havt tað trupult, síðani vinnan varð rakt av ILA-sjúku, og marknaðurin versnaði munandi.

Meginparturin av virkseminum á sjónum er steðgaður, og á landi gongur eisini móti endanum. Virkið Kryvjing, sum hevur havt upp í 70 fólk til arbeiðis at virka alilaks, letur væntandi aftur um hálvan annan mánað, og tá er eingin alilaksur eftir at taka í Norðoyggjum.

Alifeløgini í Norðoyggjum liva í óvissuni, tí tey vita ikki, hvussu tað verður við virkseminum í Norðoyggjunum.

– Bæði Faroe Salmon og East Salmon eiga smolt at seta út, men tað er trupult at fáa fígging til virksemið. Eginpeningurin í Faroe Salmon er burtur, og peningastovnarnir krevja nýggjan eginpening fyri at fíggja virksemið. Men tað er sera trupult at skaffa nýggjan eginpening, og í løtuni vita vit ikki, um tað fer at bera til at fáa gongd í alingina aftur, sigur Heini Gregersen, sum er ein av høvuðsmonnunum í Faroe Salmon, sum hevur verið millum størstu alifeløgini í landinum.

### Alivinnan ov stór

Stjórin í Norðoya Sparikassa heldur, at alivinnan í Føroyum hevur brúk fyri so stórari fígging, at tað í longdini kann gerast ein trupulleiki hjá føroyskum peningastovnum at fíggja vinnuna.

– Samlaði eginpeningurin hjá føroysku peningastovnunum er um 2,5 milliardir krónur, og skuldin í alivinnuni hevur verið um eina milliard krónur. At lána 40 prosent av eginpeninginum út til eina einstaka vinnu, sum er merkt av so stórum váða, kann blíva ein ov stórur váði fyri føroysku peningastovnarnar í longdini, heldur Eyðfinn Reyðberg.

– Gongdin er tann vegin, at konsentratiónin í alivinnuni verður størri, og tí eru upphæddirnar, sum skulu lánast, við at gerast ov stórar fyri føroyska fíggjarheimin, heldur hann.